Kappingareftirlitið

Niels Winther Poulsen
nwp@jura.fo

Tórshavn, tann 18. oktobur 2023

**Viðv. mál nr.: 23/00408**

Kappingareftirlitið fekk tann 13. oktobur 2023 einfalda fráboðan, sbrt. §4, stk. 1, nr. 4 um, at Dagrofa Aps yvirtekur 7 matvøruhandlar frá Rema 1000.

Talan er um eina samanlegging eftir §13, stk. 1, nr. 2 tá persónur, ið longu hevur ræði á fyritøku, ella tá fyritøka við keypi av pørtum ella ognum gjøgnum avtalu ella á annan hátt fáa beinleiðis ella óbeinleiðis ræði á allari ella einum parti av fyritøku.

Samanleggingin skal fráboðast, sbrt. §16, stk. 1 í kappingarlógini, tí minst ein av luttakandi fyritøkunum hevði ein árligan umsetning í Føroyum á 75 mió. kr. seinasta ár og minst onnur av luttakandi fyritøkunum hevði ein umsetning á 75. mió. kr. á heimsstigi seinasta ár, sbrt. §14, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini

Luttakandi fyritøkur hava fráboðað eftir einfaldum leisti, tí talan er um eina yvirtøku sum kemur undir § 3, stk. 1, nr. 4 í reglugerð nr. 20 frá 20. juli 2012 um fráboðan av samanleggingum.

Dagrofa er ein dagvørufyritøka, sum hevur høvuðssæti í Ringsted, og sum rekur fleiri dagvørumerkir, sum partvís eru handlar sum Dagrofa eigur og rekur, men fyrst og fremst handlar, sum sjálvstøðugir keypmenn reka í samstarvi við Dagrofa. Talan er um dagvørumerkini Meny, Spar, Min Købmand og LetKøb. Harumframt rekur Dagrofa heilsøluvirksemi og selur í hesum sambandi vøru til føroyskar handlar. Dagrofa seldi í 2022 vørur til Føroyar fyri uml. kr. [....]. Eigarin í Dagrofa er umvegis ymisk feløg, Norges Gruppen A/S, sum eigur 49%, KFI vinnurekandi grunnur, sum eigur 41% og tey síðstu 10% eru ogn hjá sjálvstøðugum keypmonnum.

Rema 1000 er dagvøruketa, sum áðrenn keypið av handlum frá Aldi, hevði 363 handlar í Danmark. Rema 1000 er franchaiseskipan, har lokalir sjálvstøðugir keypmenn reka handlarnar undir merkinum Rema 1000. Rema 1000 hevur frá donsku kappingarmyndugleikunum fingið loyvi at yvirtaka 114 dagvøruhandlar frá Aldi.
Rema 1000 er ein partur av Reitan felagsskapinum, har Reitan A/S í Norra er móðirfelag.

Talan er um eina samanlegging, sum er avleiðing av, at Aldi í Danmark gevst við sínum virksemi, og tí hevur avhendað 114 dagvøruhandlar til Rema 1000 Danmark A/S. Tann avhendingin bleiv góðkend av

donsku kappingarmyndugleikunum tann 30. august 2023. Dagrofa Aps hevur síðani yvirtikið 7 av hesum handlum frá Rema 1000.

Teir 7 handlarnir, sum verða keyptir frá Rema 1000, seldu tilsamans fyri uml. kr. [....]. Hesar 7 handlarnir hava onga sølu til Føroyar, men bert til danskar kundar í nærumhvørvinum. Teir 7 handlarnir, sum Dagrofa Aps keypir, liggja í Helsingør, Risskov, Tønder, Esbjerg Ø, Grenå, Herning og Esbjerg V.

Kappingareftirlitið hevur við heimild í §15, stk. 5 í kappingarlógini tikið avgerð um at góðkenna yvirtøkuna hjá Dagrofa Aps av 7 mathandlum hjá Rema 1000 vísandi til §15, stk. 2 Í kappingarlógini. Sambært ásetingini skal ein yvirtøka, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, góðkennast.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

Súsanna Thomsen
Fulltrúi